H E I L S U F R Ø Ð I L I G A   S T A R V S S T O V A N

Tórshavn, hin 27. september 2002
Málnr.: 613-200100564-10
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: EE / Tlf.: 35 64 20

P/F Salmon Proteins
Postrúm 9
FO-470 EIÐI

# UMHVØRVISGÓÐKENNING
# AV
# VIRKINUM HJÁ
# P/F SALMON PROTEINS Á EIÐI


1 Umsóknin ....................................................2
  1.1 Av viðkomandi tekningum eru: .............2
2 Lýsing av virkinum .......................................2
3 Málsviðgerð ..................................................3
4 Góðkenningartreytir......................................3
  4.1 Innrætting og rakstur ...........................3
  4.2 Óljóð og ljós ........................................3
  4.3 Luftútleiðing .........................................4
  4.4 Vatn og spillvatn....................................4
  4.5 Goymsla ................................................5
  4.6 Burturkast .............................................5
  4.7 Óhapp ...................................................5
  4.8 Innaneftirlit ...........................................5
  4.9 Rakstrarskráseting ................................6
5 Almennar treytir ...........................................6
6 Kæruvegleiðing .............................................7



Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: feagency@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

# UMHVØRVISGÓÐKENNING
# AV
# VIRKINUM HJÁ
# P/F SALMON PROTEINS Á EIÐI

Við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann veita umhvørvisgóðkenning til virkið hjá P/F Salmon Proteins á Eiði.

Umhvørvisgóðkenning verður givin við teimum treytum, sum eru lýstar í partinum um “Góðkenningartreytir” niðanfyri.

## 1 Umsóknin

Heilsufrøðiliga starvsstovan fekk tann 13. februar 2002 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá P/F Salmon Proteins á Eiði.

Saman við umsóknini og seinni eru móttiknar tekniskar upplýsingar um virkið, útleiðingar og framleiðslu, umframt upplýsingar um tíðarætlanir.

### 1.1 Av viðkomandi tekningum eru:

1.1.1 Kort við matrikkulering yvir økið.
1.1.2 Støðuplanur, ið vísir, hvussu virkið liggur í umhvørvinum.
1.1.3 Yvirlit yvir útbúnað.
1.1.4 Rúmyvirlit.
1.1.5 Prosessflóð yvir Há- og Lá-vandaevni.
1.1.6 Kloakkplanur.
1.1.7 Síðumyndir av bygningi.

Formateret: Punktopstilling

Eitt uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent felagnum og kommununi til viðmerkingar 20. juni 2002 . Hvørgin hevði nakrar viðmerkingar til treytirnar í góðkenningini.

## 2 Lýsing av virkinum

Virkið er staðsett á matr. nr. 400a á havnaøkinum á Eiði (sí HS-málnr. : 200100564-4).
P/F Salmon Proteins er eitt nýstovnað felag, ið hevur til endamáls at savna saman og viðgera lívrunnið burturkast frá alivinnuni í Føroyum. Felagið skal viðgera burturkast úr bæði lá- og há-vandaevnisbólkunum, men á sundurskildum framleiðsluútbúnaði.

**Lá-vandaevni:**
Hetta er vanligt slógv frá kryvji- og góðskingarvirkjunum í Føroyum. Virkini súrga slógvið við meyrusýru. Henda súrløga verður síðani innsavnað og førd til virkið hjá P/F Salmon Proteins. Á virkinum verður súrløgan pumpað í goymslutangar. Eftir hetta verður súrløgan flutt av landinum. Talan er tí ikki um viðgerð av súrløguni, men bert innsavning, goymslu og sølu.

**Há-vandaevni:**
Her er talan um sjálvdeyðan og sjúkan fisk frá alistøðunum í Føroyum. Alistøðirnar súrga slógvið við meyrusýru. Henda súrløga verður síðani innsavnað og førd til virkið hjá P/F Salmon Proteins. Á virkinum verður súrløgan pumpað í ein rávøru-goymslutanga. Úr rávøru-goymslutanganum verður súrløgan pumpað í ein trýststerilisator. Trýststerilisatorurin verður fyltur í bektum. Súrløgan verður kókað í 20 min. við 133° C og 3 bar trýsti. Eftir at súrløgan er kókað, verður hon pumpað yvir í ein liðugvørugoymslutanga. Steriliseraða súrløgan verður flutt av landinum.

Kommentar [ÁJ1]: bekt -ar -ir kv2 1 (sj.) bakstur (2), baking (2), ein bekt 2 (teld.) fleiri atgerðir gjørdar í einum [en. batch

Ein gjøllari lýsing av virkinum og av umhvørvisviðurskiftunum er at finna í fylgiskjali 1 (HS málnr.: 200100564-8).

## 3 Málsviðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á hesi viðurskifti:
- At virksemið ikki elvir til luktampar í nærumhvørvinum.
- At útleiðingin av framleiðsluspillvatni verður hildin innanfyri mørk, sum eru mett at vera umhvørvisliga trygg.

## 4 Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av hesum ásetingum:

### 4.1 Innrætting og rakstur

4.1.1 Virkið skal verða staðsett og rikið soleiðis, sum sagt er frá í fylgiskjali 1 (HS málnr.: 200100564-8).
4.1.2 Eftir at virkið er liðugt, skal alt burturkast frá arbeiðinum burturbeinast í samsvari við galdandi kunngerð um burturkast, og økið rundan um virkið skal hampast.
4.1.3 Øki, sum hoyra til virkið, skulu verða týðiliga avmerkt.
4.1.4 Møguligir lekar skulu kunna haldast aftur á økinum og skulu kunna takast upp.

Formateret: Punktopstilling

4.1.5 Undir arbeiði, har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.
4.1.6 Nýtslan av klori skal vera minst møgulig.
4.1.7 Virkið skal arbeiða fram ímóti meiri umhvørvisvinarligum sóttreinsingarhátti av spillvatninum.

### 4.2 Óljóð og ljós

4.2.1 Raksturin á staðnum má ikki hava við sær, at óljóðstøðið, ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A), fer upp um niðanfyri standandi mørk máld við næsta grannamark. Í krøvunum veldst tað um, hvat økini rundan um verða nýtt til.

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán. – frí. | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygar. | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán - frí. | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygar. | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

4.2.2 Tað hægst loyvda óljóðstøðið frá virkinum í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um tey nevndu markvirðini á nevndu økjunum.
4.2.3 Nýtsla av ljósum skal vera soleiðis, at hetta ikki hevur við sær ampa.

## 4.3 Luftútleiðing

4.3.1 Alt virksemið skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær lukt- ella dustampar í nærumhvørvinum.
4.3.2 Virkið skal yvirhalda hesi markvirði fyri luktimmisión:
a. 5 LE (lukteindir) í eini frástøðu meiri enn 50 m frá virkismarkinum.
b. 10 LE í eini frástøðu styttri enn 50 m frá virkismarkinum.
4.3.3 Verða klagur um lukt, og metir Heilsufrøðiliga starvsstovan tað neyðugt – tó hægst eina ferð um árið – skal P/F Salmon Proteins veita prógv fyri, at treyt 4.3.2 er hildin. Prógvið skal veitast við akkrediteraðari sýnistøku og luktkanning á eini av Heilsufrøðiligu starvsstovuni góðkendari starvsstovu.
4.3.4 Útlátið av dálkandi evnum skal altíð vera minst møguligt. Ketilin á virkinum er settur til at kunna halda hesi virði, sum eisini verða sett sum markvirði:

| Evni | Markvirði mg /Nm$^3$ av turrum roykgassi við 10% $O_2$ |
|---|---|
| $NO_2$ | 153 |
| CO | 100 |

4.3.5 Tá meira enn 3 ár eru farin síðan góðkenningin varð givin, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta markvirðini fyri NOx og CO.
4.3.6 Svávulinnihaldið í brennioljuni má ikki vera hægri enn 1%. Innihaldið av svávul skal kunna skjalprógvast.
4.3.7 Um ampar verða av dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

## 4.4 Vatn og spillvatn

4.4.1 Virkið skal seta vatnmátara upp, sum mátar vatnnýtsluna á virkinum.
4.4.2 Alt spillvatn frá framleiðsluni og frá vaski av virkinum skal leiðast í kloakkskipan út á streymasjógv.
4.4.3 Sjógvur, sum hevur verið nýttur til kølivatn, skal leiðast út um bátahylin.
4.4.4 Munnin á spillvatnsútleiðingunum má ikki vera sjónligur í lægstu fjøru.
4.4.5 Áðrenn spillvatnið verður leitt út, skal tað leiðast gjøgnum eina passandi dimensjoneraða

reinsiskipan, so at ásettu markvirðini fyri spillvatn kunnu haldast, sí punkt 4.8.7.
4.4.6 Reinsiskipanin skal vera undir regluligum eftirliti, og tømast eftir tørvi, men í minsta lagi eina ferð um mánaðin.
4.4.7 Eftir reinsiskipanina skal vera ein sýnistøkubrunnur.
4.4.8 Spillvatnið í sýnistøkubrunninum má ikki bera brá av feitti ella olju.

**4.5 Goymsla**

4.5.1 Kemikaliugoymslan skal vera vard ímóti vindi og regni.
4.5.2 Undir goymsluni av kemikalium skal vera kar til at taka ímóti møguligum lekum ella spilli. Rúmdin á karinum skal vera størri enn rúmdin á største kemikaliuílatinum.
4.5.3 Goymslutangar, sum innihalda illa luktandi rávøru ella lidna vøru, skulu hava útveggir og tak málað við einum liti, sum hevur ein samlaðan stráluhitareflektiónskoefficient uppá minst 70%. Fyri eksisterandi tangar kann arbeiðið gerast sum ein liður í vanliga, regluliga viðlíkahaldinum. Treytin er ikki galdandi fyri tangar, sum eru íbundnir luftreinsiskipanir.
4.5.4 Møguligir lekar frá goymslutangum skulu kunna haldast aftur og takast upp.

**4.6 Burturkast**

4.6.1 Alt húsarhalds- og virkisburturkast skal viðgerast í samsvari við galdandi reglur um burturkast, so sum kunngerð um burturkast.
4.6.2 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og tað skal skiljast sundur sambært galdandi reglum hjá móttakara.

**4.7 Óhapp**

4.7.1 Henda óhapp, sum hava dálking við sær, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk, so sum uppruddíng, avmarking og fyribyrging, til eitt støði, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka. Boðast skal frá til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni beinanvegin.

**4.8 Innaneftirlit**

4.8.1 Sum innaneftirlit skal P/F Salmon Proteins taka 4 sýni av spillvatninum um árið. Sýnini skulu takast javnt býtt yvir alt árið. Sýnini skulu takast úr sýnistøkubrunninum hjá virkinum.
4.8.2 Kannast skal á hvørjum ári, um markvirðini fyri $NO_x$ og CO verða hildin.
4.8.3 Títtleikin av sýnistøkum kann verða broyttur av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
4.8.4 Allar sýnistøkur og kanningar skulu gerast av starvsstovu, sum er góðkend av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
4.8.5 Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av virkinum.
4.8.6 Virkið skal lata gera kanningar av spillvatninum, fyrstu ferð innan 2 mánaðir aftaná, at virkið er farið í gongd.
4.8.7 Spillvatnið skal yvirhalda hesi markvirðini:

| Evni | Markvirði | Kanningarháttur |
|---|---|---|
| Olja (mineral) | Max. 10 mg/l | DS/R 208 |
| Olja/feitt | Max. 50 mg/l | DS/R 208 |
| Botnfelliligt evni | Max. 10 ml/l | DS 233 |
| Suspenderað evni | Max. 300 mg/l | DS 207 |
| PH | min. 6,5 – max. 9,0 | Elektrodur og/ella samanhangandi máting |

4.8.8 Víðkað kanningarskrá kann í serligum føri verða umbiðin av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

### 4.9 Rakstrarskráseting

4.9.1 Virkið skal føra rakstrarbók, ið skal innihalda hesar upplýsingar:

a. Móttiknar rávørunøgdir, útvegari og TVN innihald.
b. Nøgdir av hitaviðgjørdari súrløgu.
c. Nýtsla av tilsetingarevnum, reingerðaevnum og sóttreinsingarevnum.
d. Vatnnýtsla og orkunýtsla, útgreinað eftir slagi.
e. Svávulinnihald í oljuni.
f. Avhendaðar nøgdir av burturkasti, til brenning, tyrving ella endurnýtslu, og móttakari.
g. Nøgd og slag av vandamiklum burturkasti (olju- og kemikaliuburturkast) og móttakari.
h. Avhendaðar nøgdir úr reinsiskipan og móttakari.
i. Úrslitini av spillvatnsgreiningum.
j. Rakstraróhapp, og møgulig orsøk.
k. Frágreiðing við atlit til punkt 4.1.7 og 4.1.8.

4.9.2 Rakstrarbókin skal vera á staðnum, og eftirlitsmyndugleikin skal kunna síggja hana eftir umbøn. Bókin skal goymast í 5 ár.

4.9.3 Árlig uppgerð av rakstrarskrásetingunum skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

## 5 Almennar treytir

Virkið hevur skyldu til at fylgja grundregluni um at minka um nýtsluna av tilfeingi, dálking og útlát mest møguligt, uttan so, at tað viðførir órímiligan kostnað.

Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Heilsufrøðiliga starvsstovan kann broyta eftirlitstreytirnar, um hildið verður, at hetta er neyðugt fyri at fremja eitt munadyggari eftirlit.

Eitt eintak av hesi góðkenning skal altíð vera tøkt á virkinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.

Annað umhvørvistyngjandi virksemi enn tað, sum er lýst í umsóknini, má ikki fara fram. Um ivamál taka seg upp, ger myndugleikin av, hvat umhvørvistyngjandi virksemi er.

Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

## 6 Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til Føroya landsstýri. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir kæruna til Føroya landsstýri við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Avrit:** Arbeiðseftirlitið, Postrúm 1134, FO-100 Tórshavn
Føroya landsstýri, Vinnumálastýrið, Postrúm 377, FO-100 Tórshavn
Føroya landfúti, Postrúm 3018, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn
Landsdjóralæknin, Postrúm 139, Tinganes, FO-110 Tórshavn
Eiðis kommuna, FO-470 Eiði.